átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend snorri@sosialurin.fo



orðið



*Hesa vikuna:*

**John S. Myllhamar**

**Eingin veit, hvør sonurin er, uttan faðirin, ella hvør faðirin er, uttan sonurin og tann, sum sonurin vil opinbera hann fyri**

Lukas 10.22

Vit eiga at bíta merkið í hetta orðið: "Tann, sum sonurin vil opinbera hann fyri". Nei, ikki fyri vísum og vitrum, t.v.s. slík, ið halda seg sjálv vera vís, sum ikki eru børn, ikki fátæk í andanum, vesæl, blind og nakin í egnum eygum, men við egnari megi royna at vinna rættvísi.

Eyðmjúk børn gerast vit bara, um vit vita, hvat syndaneyð er og hava verið stødd í henni. Hava sæð, at í og úr teirri neyð koma vit ikki við egnari megi. Men bara Jesus kann opinbera hetta fyri eini menniskju.

Trúgva vit øllum tí, sum hin nýggi sangurin sigur um, hvat lambið hevur uppiborið - sangurin, sum í allar ævir skal vera nýggjur og til gleði fyri tey sælu, og hann kortini ongantíð hevur fylt teg við gleði - skilir tú tá ikki, at trúgv tín er deyð?!

Trúgva vit, at vit gjørdust sátt við Guð, tá ið Jesus doyði á krossi meðan vit enn vóru syndarar, og kortini ongantíð hava funnið troyst og gleði í tí, og ongantíð hava fingið frið í okkara sál og sinn, tá er ikki rætt vorðið við trúgv okkara.

Vit hava hoyrt tað mangar ferðir at bara vantrúgvin, ella at vit siga nei takk til Guðs innbjóðing, kann føra til ævigan undirgang. Kortini heldur tú, at tá ið tú sjálvur er óndur og óverdur, so er Guð vreiður inn á teg. Á hendan hátt kann tú av egnum royndum síggja munin á kunnleikanum um Guð, sum vit kunnu siga við hvønn annan, og so tað, ið nevnist: at vera lærdur av Guði. Amen!

# Fari har sum Gud leiðir meg



*Í Russlandi arbeiddu tey nógv saman við børnum. Her er Rebekka avmyndað saman við tveimum smágentum í lítlu bygdini Nyrob*

**Í vár var 18 ára gamla Rebekka Petersen úr Kollafirði á kristnum lærusveinaskúla í USA í fimm mánaðir. Nú fer hon aftur á sama stað – Eg ynski at fara, hagar Gud leiðir meg, sigur hon**

Hósdagin legði Rebekka enn einaferð leiðina móti Orlando í Florida, har felagsskapurin Youth With A Mission hevur ein av mongu skúlum sínum.

Á skeiðnum í vár var millum annað dentur lagdur á tey grundleggjandi viðurskiftini í kristnu trúnni: guds kærleiki, hvat merkir tað at trúgva á Gud, og hvat er Hansara ynski við hvørjum einstøkum menniskja.

- Vit fingu haraftrat greitt at vita, hvussu høgt Gud elskar okkum og onnur menniskju. Út frá hesum áttu vit tí at fara út at vísa teimum henda sama kærleikan í orði og verki, greiðir Rebekka frá.

Tey sótu á skúlabonki helvtina av tíðini, meðan tey vóru úti og boðaðu gleðiboðskapin seinnu helvtina. Rebekka og hennara bólkur vóru í Russlandi.

Hetta var ein sera góður túrur. Men Rebekka sjálv fekk størstu upplivingina, tá tey komu aftur til USA, og skuldu út at vitja kirkjur at greiða frá ferðini.

- Her tosaði eg við eina systrina til tann eina drongin, sum var í okkara bólki. Vit prátaðu nógv saman, har eg millum annað greiddi henni frá míni trúgv. Seinni fekk eg enntá møguleika at biðja saman við henni, og hon bleiv eisini frelst. Tað var ótrúliga stórt!, sigur Rebekka brosandi.

## Hann leiðir

At vera fimm mánaðir á einum slíkum skúla hevur ikki tikið hugin frá henni at fara aftur á sama stað. Hon fer nú á eitt longri skeið, sum varir heilt fram til mars mánað komandi ár.

Uppleggið her er í stóran mun tað sama: Fyrst verður eitt skeið í frálæru, her tey millum annað fara at læra um aðrar religiónir og hvussu tey kunnu møta teimum við gleðiboðskapinum. Síðani fara tey at ferðast kring um í USA og helst eisini til Mexico í somu ørindum.

Tann stóri spurningurin til Rebekku er, hvat hon ætlar sær víðari við lívi sínum. Fyri hana er hetta í stóran mun ein óviðkomandi spurningur.

- Fyri meg er tað ikki ein spurningur um eg skal á skúlabonk í Føroyum, Danmark ella eg fari allan vegin til Afrika.

- Mítt hægsta ynski er at gera Gud kendan. Hann er mítt eitt og alt. Og tí fari eg hagar sum Hann leiðir meg, sigur hon avgjørd.

**Barnabønin svarað**

**At Rebekka endaði á hesum lærusveinaskúlanum í Orlando í Florida hevur sína serstøku søgu. Tá hon var lítil, hugsaðu foreldrini um at flyta hagar. Hetta varð kortini av ongum, men Rebekka bað tá um, at fóru foreldrini ikki, so kundi Gud senda hana. Tá hon so mong ár seinni skuldi fara á sama skúla, rann henda barnabønin fram fyri hana aftur. - Ja, ein má ansa eftir hvat ein biður um. Gud svarar nevniliga bønum!, sigur Rebekka við einum brosi.**



*Allur flokkurin á veg til Russlands at evanglisera. – Hetta var ein ótrúliga góður túrur, sigur Rebekka, hvør klæðir samsvara við litin á flogfarinum*

## MF-leiðari vitjar KM

**Ársmøti:** Hetta vikuskiftið skipar Kirkjuliga Missiónsfelagið (KM) fyri ársmøti sínum í Havn. Møtini byrjaðu í gjárkvøldið og verður hildið á til sunnukvøldið.

Til hetta høvið er leiðarin á Meinigheitsfakultetinum (MF) í Århus, Ingolf Henoch Petersen komin higar at tala. Hann talaði á møtinum í gjárkvøldið og verður at hoyra allar dagarnar sum talari á møtum og bíbliutíma.

Leygarkvøldið kl. 20 verður sjónvarpsmøti, har sóknarpresturin Hanus Simonsen og Jústinus Poulsen úr Hvannasundi tala, og fólk av Strondum syngja.

Ársmøtið endar sunnudagin kl. 17 við møti, har Ingolf Henoch Petersen og Tummas Lauritsen tala.

## Dupultkvartettin á Danmarkarferð

**Ebenezer:** Vælkenda Dupultkvartettin í Ebenezer er í hesum døgum á vitjan í Danmark.

Teir átta syngjandi menninir høvdu í gjárkvøldið eina serstaka konsert saman við sangaranum, Larry Ford ið mong munnu kenna aftur í Gaither-samanhangi.

Í kvøld verður sangmøti við Dupultkvartettini í Kristnastovu, meðan teir sunnumorgunin luttaka við eina gudstænastu í Kristent Fællesskab í Rødovre og um kvøldið við eina konsert í Templet í Keypmannahavn.

## Læra at sita, ganga og standa

**Hvítusunnusamkomur:** Hóskvøldið í farnu viku byrjaði eitt heldur øðrvísi skeið, sum Evangeliihúsið í Havn og Filadelfia Vágar saman skipa fyri.

Endamálið við skeiðnum er millum annað at luttakararnir skulu síggja Guds ævigu ætlan og endamál hansara. Hetta verður gjørt í trimum stigum – at sita og at ganga, soleiðis at fólk kunnu verða før at standa føst í trúnni.

Skeiðið verður hildið upp á skift í báðum støðum. Byrjað verður við náttúrða, og síðani verður undirvísing og orðaskifti.

Skeiðini enda seinast í november mánaði.